## Martin Joensen á Fjarðafestivalin

Yngsti festivalurin í Føroyum boðar frá, at Martin Joensen verður millum teirra, sum framføra í Skálabotni í summar. Hóast Martin ongantíð hevur lagt lok á, hvat hann trýr, so er tað ikki so nógv í kristnum høpi, at hann hevur verið sæddur. Tí verður tað serliga spennandi at hoyra, hvat hann fer at framføra á Fjarðafestivalinum, sum er frá 23.-25. august. Les meiri um festivalin á www.fjardafestival.com.



# Langir, men góðir dagar

**Nú Summar Festivalurin nærkast, eru tað nógvar fyrireikingar, ið skulu gerast. Eitt av støðunum, ið arbeiðir undir hátrýsti í løtuni er Norðoya Kunningarstova, ið millum annað tekur sær av tjaldingini á festivalinum**

SUMMAR FESTIVALURIN
*Petur Háberg*

Á Norðoya Kunningarstovu verður arbeitt til seint út á kvøldarnar í hesum døgum:

- Vit hava havt meiri enn nokk at gjørt seinastu tveir mánaðirnar, men tað er serliga nú í seinastuni, at tað veruliga hevur staðið á. Vit byrja klokkan átta um morgunin og fara ofta ikki heim fyrr enn klokkan nærkast midnátt, sigur Maiken Stenberg, ið er leiðari á kunningarstovuni.

### Tey ungu sleppa at larma

Umframt at taka sær av bátunum, ið koma á vitjan, so hevur Norðoya Kunningarstova eisini alla tjalding undir hond:

- Vit vænta okkum eini 200-300 tjaldarar. Talan verður um ymisk øki til ymisk fólk. T.d. so verður familjuøkið tætt við festivalplássi, soleiðis at tað ikki er so langt at ganga hjá børnum. Tey ungu fáa eisini sítt pláss, har tey kunnu larma og vera tey, sum tey eru.

Meðan allir vanligu gistingarmøguleik arnir, sum t.d. summarhús, íbúðir og 'bed and breakfast', langt síðani eru farnir, so ber framvegis til at fáa tjaldingarpláss:

- Tað eru eini 100 tjaldingarpláss eftir, men tað eru bara nøkur fá av teimum, ið eru á familjuøkinum. Sum sagt, so liggur familjuøkið inni í býnum, so har er rættiliga avmarkað pláss. Vanligu tjaldingaplássini liggja eitt sindur longri burtur frá festivaløkinum.



*- Vit hava ymisk tjaldingarøki til ymisk fólk. Tey ungu fáa eitt øki, har tey kunnu vera ung og larma, sigur Maiken Steinberg, leiðari á Norðoya Kunningarstovu*

*Savnsmynd*

### Húsvognainnrás

Rullandi húsvognar møta eisini fjølmentir:

- Eg haldi, at vit høvdu millum 20-30 húsvognar á Summar Festivalinum í fjør. Í ár vænta vit umleið 90 húsvognar, so hetta er uttan iva heimsmet í Føroyum, sigur ein skemtandi Maiken, ið tekur longu arbeiðsdagarnar við einum smílið:

- Hóast tað er tíðarkrevjandi og strævið, so er tað hugaligt at vera partur av einum so stórum tiltakið. So nógv fólk eru í gongd og fáa tað upp at koyra. So dagarnir eru langir, men góðir hóast alt. Kanska man ikki fær allan festivalin við, men okkurt vóna vit at hoyra.

# Sjúrður Skaale gleðir seg

**Í fjør gjørdi mjørkin Summar Festivalin avbjóðandi fyri frásøgumannin Sjúrða Skaale, men royndi undirhaldarin dámdi væl upplivingina, ið hann helt vera stuttliga, serliga tí nærum alt at enda eydnaðist.**

SUMMAR FESTIVALURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Aftur í ár verður tað Sjúrður Skaale, ið verður frásøgumaður á stóra pallinum á Vágsbøi, tá Summar Festivalurin verður um vikuskiftið. Sjúrður var eisini frásøgumaður í fjør, og hetta var sambært honum ein stuttlig uppliving.

-Tað var stuttligt, mjørkin gjørdi, at tað alla tíðina var nær við at miseydnast. Onkur bólkur sat í Kastrup frá klokkan 8 um morgunin, onkur endaði í Íslandi, onkur endaði í Noregi og onkur endaði bæði í Íslandi og Noregi, og so varð eitt eyka flogfar sett inn. Alla tíðina var tað ein balansa millum succes og fiasko, men í flestum førum koppaði tað rætta vegin, og tá var tað stuttligt. Humørið var eisini høgt alla tíðina. Tað var stuttligt, tá Johnny Deluxe skuldi á pallin og Roger Hodgson samstundis kom við tyrlu flúgvandi yvir konsertøkið, meðan útgerðin hjá honum kom við rasarabili úr Vágum. Sjálvt um konsertin við Hodgson ikki endaði fyrr enn um fimm tíðina sunnumorgunin, so eydnaðist tað, og kendist tað gott at standa har og hoyra hann, ikki tí tað var tann tónleikaliga besta konsertin, men humørið var høgt, greiður Sjúrður frá.

Royndi undirhaldarin og frásøgumaðurin ræðist ikki, at skula á pall framman fyri 10.000 áskoðarum.

- Nei, tað er einki problem. Eg havi fyrireikað meg við at lesa eitt sindur uppá um bólkarnar, og tað uppgávan er ikki so trupul, tá alt riggar. Tann veruliga avbjóðingin kemur tá okkurt ikki riggar.



*Sjúrður Skaale gjørdi sítt til, at góða lagið ongantíð gjørdist ringt á Summar Festivalinum í fjør*

*Mynd: Niels Uni Dam*